# Eivør og Sissel stjólu myndina

**Tær báðar stóðu klárast í minninum á lurtarunum, tá konsertin The European Divas, Frostroses 2006, var liðug. Hetta metir heimildarmaður okkara í Íslandi, Jens Guð, og ummælarin á Morgunblaðnum er samdur**

TÓNLEIKUR
*Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Jens Guð hevur áður sagt okkum, at Eivør stjól myndina til Lennon-konsertirnar í Íslandi. Hann er sannførdur um, at saman við Sissel Kyrkjebø stjól Eivør myndina, tá The European Divas fóru á pall 5. desember.

Og ummælarin á Morgunblaðnum fegnast eisini um tær báðar.

Útseldu konsertirnar við The European Divas, Frostroses 2006, vóru tann 5. desember.

Ummælarin á Morgunblaðnum sigur m.a.;

"Tá Eivør og Sissel Kyrkjebø fóru á pall saman og sungu "In the lonely dark of the night", kom rættuligt lív í fjøldina. Hormoniurin í røddum teirra var perfektur. Eg fekk gásahold. ...Sissel hevur høga, klára rødd ræddarteknikkurin er í toppi. Eivør er øðrvísi. Hon hevur meira rúm í røddini og røddin er so litrík, at hon er avgjørt millum fremstu sangarinnur í Europa. Saman stjólu tær báðar myndina – tær vóru stjørnurnar", skrivar Morgunblaðið.

Aðrar, ið tóku lut í konsertini vóru Ragnhildur Gísla, sum áður sang við í íslendsku Støðumenn, Patrecia Bardon, mezzo sopran, Ísland, Petula Clark úr Onglandi, tvær ferðir Grammy vinnari, og Eletreria Arvanitaki, Grikkaland.

Ummælarin á Morgunblaðnum endar við at siga, at allastaðni har hann kom eftir konsertina, tosaðu fólk um stjørnurnar á konsertini, Eivør og Sissel.

Og hetta sampakkar við tað, ið heimildarmaður okkara, Jens Guð, hevur hoyrt fólk tosað um eftir konsertina. Tað eru Sissel og Eivør Pálsdóttir, ið prátað verður um manna millum. Tær stjólu myndina.



# KROSSORÐ




## Vinnari:

*E. Thomsen*
*Velbastaðvegur 60*
*Tórshavn*

## Loysnin frá seinastu viku
## Loysunarorðið: DAGASKIL

| | | | | | | | | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| D | J | Ú | P | V | A | T | N | S | T | R | O | L | A | R | I |
| LU | I | G | I | | G | Í | | N | | A | | Í | Ð | A | N |
| N | R | | | V | A | Ð | B | E | I | N | | N | A | I | N |
| N | I | E | L | S | P | A | U | L | I | | G | U | L | N | A |
| U | | P | I | | E | R | | L | | K | Y | K | | A | N |
| H | S | | T | Á | | R | A | U | L | | | V | A | R | G |
| Y | L | U | R | | B | I | R | T | A | | P | E | R | | A |
| L | Í | N | U | B | Á | T | U | R | | T | E | Y | M | A | R |
| U | K | | M | Á | L | | M | U | | Á | R | L | A | | Ð |
| R | A | K | | R | | A | | M | S | | M | A | R | I | S |
| RI | | R | | A | U | T | O | L | Í | N | U | R | | L | T |
| N | | O | K | N | I | N | | A | L | D | R | I | N | | E |
| 486 | H | A | R | | G | I | N | | | R | | | E | L | I |
| R | O | T | I | N | | | | A | R | | S | T | Y | G | G |
| MO | | I | | E | B | B | E | S | E | N | | V | S | | A |
| K | R | A | F | T | B | L | O | K | K | A | B | Á | T | U | R |

## Hvønn fríggjadag

er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í seinasta lagi hósdagin. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum fríggjadagin.

Sendið loysunarorðið til: Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn – og viðmerkið »Krossorðagáta nr. …« á bjálvan.

**Loysunarorðið:** ........................................ **487**

Navn: ........................................................

Bústaður: ....................................................

Bygd/býur: ..................................................

***Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!***

Frá ***BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:***

- ☐ **Okkara kokkar** – *Gudmund Gudmundsson*
- ☐ **Grund 1** – *Steinbjørn B. Jacobsen*
- ☐ **Ein farri av kolvetni** – *Marjun Kjelnes*
- ☐ **Veður og tíðindi í Føroyum 1875–2002** – *Petur Skeel Jacobsen og Finnbogi Ísakson*

Frá ***FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:***

- ☐ **Heimsatlas**
- ☐ **Føroysk Flora** – *Jóhannes Jóhansen*
- ☐ **Havið** – *Bogi Hansen*
- ☐ **Heimsins lond**
- ☐ **Grót og steinar** – *Martin Heinesen týddi*

***Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt***